## Bøndur í neyð

Danskir bøndur, sum ala høsnarungar, hava tað strævið fíggjarliga í hesum tíðum, skrivar Ritzau. Í fjør vórðu 106 mió. høsnarungar avlívaðir í Danmark, og tað var 25 prosent minni enn árið fyri. Tvinnar orsøkir eru til aftur-gongd-ina. Onnur er, at í tí arabiska heiminum hava fólk ikki gloymt tekningarnar av Muhammed profeti, og hin er, at nógvir útlendingar góvust við at keypa danskar høsnar-ungar eftir ein tilburð av fuglakrími í fjør.



## Nógv at gera




Í smiðjuni hjá Bent Mortensen í Vági ella Tangavirkinum, sum fyritøkan nú eitur, hava teir úr at gera í hesum døgum. Mortan Mortensen, stjóri, sigur við Suðurrás, at teir hava nógvar bíleggingar, og at tað tí er hugaligt at líta frameftir. Umframt teir vanligu oljutangarnar til sethús hava teir fleiri seruppgávur, og eru tað serliga fyritøkur norðanfjørðs, sum bíleggja arbeiði í Vági. Tangavirkið hevur 75 át á baki seinni í mánaðinum.




Trapputing um orku og umhvørvi:

# Orka, umhvørvi og framtíðin


*Sigurð í Jáupsstovu, stjóri á Jarðfeingi*


*Bogi Hansen, professari í havumhvørvi*


*Klæmint Weihe, stjóri í SEV*


*Jákup Sólstein, formaður Føroya Reiðarafelag*


*Bergmann Finsson, Agenda21 ráðgevi*

**- eru Føroyar partur av altjóða samfelagnum í hesum høpi?**

UMHVØRVI
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Soleiðis ljóðar yvirskriftin á Trapputinginum, sum Miðlahúsið í Vágsbotni skipar fyri fríggjakvøldið.

Við pallborðið sita:

- Sigurð í Jákupsstovu, stjóri á Jarðfeingi
- Bogi Hansen, professari í havumhvørvi
- Klæmint Weihe, stjóri í SEV
- Jákup Sólstein, formaður í Føroya Reiðarafelag
- Bergmann Finnsson, Agenda21 ráðgevi.

Kjakið verður lagt soleiðis til rættis, at luttakararnir fáa 10 minuttir í part til framløgu, og síðani verður orðið frítt. Orðstýrari verður Uni Arge.

**Fyrst Trapputing – síðani Løgting**

- Nú Løgtingið fer at hava aðalorðaskifti um orku týsdagin, hildu vit tað vera upplagt, at taka hetta nógv umrødda og týðandi evnið upp á Trapputinginum. Hetta er eitt stórt mál, ið bæði snýr seg umhvørvið og framtíðina, og harvið eisini um lokal og global orku- og umhvørvismál. sigur Jan Müller, ábyrgdarblaðstjóri á Sosialinum og stigtakari til Trapputingið.

Miðlahúsið hevur nú í skjótt tvey ár lagt seg eftir at vera karmur um orðaskifti um alskyns aktuell mál, sum eru uppi í tíðini. Bæði mál, sum hava verið ella fara at verða viðgjørd í Løgtinginum, men eisini annað, sum upptekur fólk og annars rørist í samfelagnum.

- Vón okkara er, at Trapputingið kann vera við til, at mál fáa eina so gjølla og rættvísa handfaring, sum til ber. Eitt nú undir viðgerðini og orðaskiftinum á Løgtingi, so vit á hendan hátt eru við til at geva okkara fólkavaldu eitt betri grundarlag at taka støðu út frá, sigur Jan Müller, sum leggur dent á, at bæði fakfólk og leikfólk sleppa til orðanna á Trapputinginum.

Øll eru vælkomin fríggjakvøldið og Miðlahúsið bjóðar kaffi og smákøkur.

## VB fjepparar spenna seg út

**Til spennandi finaluhondbóltsdystin leygardagin millum VB og Stjørnuna, spenna VB fjepparar seg út og ætlanin er at hita upp í Bowlinghøllini á Hálsi í Havn**



HONDBÓLTS-FJEPPARAR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

VB hevur lagt tekningarlistar út á vanligu støðunum í Vági, har til ber at tekna seg til at koma við til Havnar at fylgja kvinnufinaluni millum VB og Stjørnuna.

Fjepparar hittast so í Bowlinghøllini á Hálsi klokkan 12.00 at hita upp, syngja og mála andlit. Heitt verður eisini á tey, ið eiga VB troyggjur, um at fara í tær.

Tá komið verður aftur til Vágs á kvøldi, verður dansur í VB húsinum.

Tíðin vil so vísa, hvørt talan verður um vinnaradans, ella vanligan finaludans.

# Heiðrikur og Jóannes stíla fyri ólavsøkuframsýningini

**Listafelagið hevur biðið ungu listamenninar, Heiðrik á Heygum og Jóannes Lamhauge um at stíla fyri ólavsøkuframsýningini í ár**

FRAMSÝNING
*Tíðindaskriv frá Listafelag Føroya*

Nevndin í Listafelagnum hevur heitt á teir báðar Heiðrik á Heygum og Jóannes Lamhauge um at stíla fyri Ólavsøkuframsýningini í 2007. Teir eru farnir undir at finna listafólk, velja verk og leggja framsýningina til rættis. Ætlanin er at blása nýtt lív í framsýningina og geva fólki eina fullkomiliga øðrvísi uppliving enn áður. Ólavsøkuframsýningin fer í ár at vísa tað, sum ung listafólk takast við.

Ólavsøkuframsýningin verður sum vant í Listasavni Føroya. Hon letur upp ólavsøkuaftan, 28.7., kl. 14, men hon verður opin longur enn vant: til 12. august 2007.

Ólavsøkuframsýningin hjá Listafelagnum hevur verið fastur táttur í ólavsøkuhaldinum síðani 1948. Í nógv ár var hon einasta listaframsýningin í landinum og tí myndlistaligi høvuðstilburðurin á árinum. Listafelagið plagdi at seta eina lýsing í bløðini einaferð um várið við upplýsing um freist fyri nær verkini máttu vera innkomin og setti síðani framsýningina saman burtur úr tí, sum var innkomið. Soleiðis verður sum sagt ikki í ár.

Mong eru tey listafólk, sum hava sýnt fram á fyrsta sinni á Ólavsøkuframsýningini, og sum síðani eru farin at fáa sær útbúgving og seinni eru vorðin sera dugnalig og viðurkend listafólk.

Ólavsøkuframsýningin var leingi Framsýningin. Nú eru fleiri aðrar fastar listaframsýningar gjøgnum árið, og ólavsøkuframsýningarnar eru nógvar umframt hana hjá Listafelagnum. Listafelagið hevur tí gjørt av at royna nýggjar leiðir.

Nevndin í Listafelag Føroya:


*Heiðrikur á Heygum og Jóannes Lamhauge - her í leikinum um Jósef og dreymakotið, skulu stíla fyri ólavsøkuframsýningini í ár*

*Malan Marnersdóttir, forkona, Katrin í Gongini, skrivari, Hilmar Høgenni, kassameistari, Marjun Sigurðsdóttir, Annika Marr Poulsen*

